# Danski EM-hópurin úttikin

**Morten Olsen, danski landsliðsvenjarin, úttók í mikudagin leikarahópin til EM-endaspælið, ið verður í Portugal seinni í summar**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kappingin um Europameistaraheitið í fótbólti í Portugal nærkast alsamt, og fleiri av leikarahópunum til kappingina eru úttiknir. Fyrradagin úttók danski landsliðsvenjarin sín hóp, og neyvan mundi talan verða um nakra óvæntaða úttøku.



*Danski landsliðsvenjarin, Morten Olsen, hevur úttikið Thomas Gravesen h.m. til EM-endaspælið, meðan tað er lítið sannlíkt, at liðfelagin hjá Toda Jónsson, Morten Bisgaard í miðjuni, fær annað av teimum báðu seinastu plássunum í hópinum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Goymt tvey pláss**

Av tí at fleiri av kappingunum í Europa ikki er liðugt spælar enn,hevur danski landsliðsvenjarin gjørt av, at tvey av plássunum í hópinum framvegis standa tóm. Tískil hevur hann fyribils bert úttikið 21 leikarar, hóast endaligi hópurin kemur at telja 23 mans. Eisini spælir tað inn, at summur av teimum leikarum, ið eru upp á tal til seinastu plássini á danska EM-liðnum, hava smærri skaðar at dragast við, og tískil verður bíðað til tess at vita, um hesir koma fyri seg. Eitt nú er høgri bakkur, Kasper Bøgelund úr hollendska PSV Eindhoven, skaddur, og ivasamt er, um hann verður klárur til EM-endaspælið.

**Bert ein útileikari úr donsku kappingini**

Morten Olsen hevur, sum áðurnevnt, úttikið 21 leikrar, og av teimum eru tríggir málverjar og 18 útileikarar. Av teimum bert tríggir leikarar úr donsku SAS-ligaini, tveir málverjar og ein útileikari. Morten Wieghorst úr Brøndby er einasti útileikarin í hópinum, sum til dagligt leikari í donsku SAS-ligaini. Annars umboða donsku leikararnir so kend feløg sum Milan, Inter, Chelsea, Borussia Dortmund og PSV Eindhoven.

EM-endaspælið í Portugal fer av bakkastokki 12. juni, og danir eru í bólki saman við grannunum úr Svøríki, Italia og Bulgaria.

## Danski hópurin

**Målmænd:**
Thomas Sørensen, Aston Villa
Peter Skov-Jensen, FC Midtjylland
Stephan Andersen, AB

**Forsvar:**
René Henriksen, Panathinaikos
Thomas Helveg, Inter
Martin Laursen, Milan
Niclas Jensen, Borussia Dortmund
Per Krøldrup, Udinese
Brian Priske, Genk

**Midtbane:**
Thomas Gravesen, Everton
Morten Wieghorst, Brøndby
Daniel Jensen, Murcia
Kenneth Perez, AZ Alkmaar
Claus Jensen, Charlton
Christian Poulsen, Schalke 04

**Angreb:**
Jon Dahl Tomasson, Milan
Jesper Grønkjær, Chelsea
Ebbe Sand, Schalke 04
Peter Madsen, Bochum
Martin Jørgensen, Udinese
Dennis Rommedahl, PSV Eindhoven

# ÍSB til Rhodos



*Durita Strøm, ið her errin vísir fram heiðursmerkini, ið hon vann í kapping í Dublin í fjør, er ein av teimum trimum føroysku íðkarunum, sum tekur lut í stóru kappingini á Rhodos*
*savnsmynd*

**Í dag byrjar ein stórur Special Olympics Festivalur á griksku frítíðaroyggini Rhodos, har tríggir føroyskir íðkarar fara at taka lut**

ÍSB
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Komandi vikuna fara tríggjar føroyskar gentur at taka lut í stora Special Olympics Festivalinum á Rhodos. Tær tríggjar genturnar eru Durita Strøm, Rannvá Strøm og Apolonia Justesen. Allir tríggjar verða tær við í svimjikappingum, og allar skulu tær royna seg í tveimum kappingum. Til tess at fyrireika seg til stóru kappingina hava Durita, Rannvá og Apolonia vant upp til fimm ferðir um vikuna í langa tíð, og tískil skuldu tær verið rættuliga væl fyri.

Í tíðindaskrivi frá ÍSB verður sagt, at stóri festivalurin á Rhodos byggir á evnið "at læra gjøgnum ítrótt", og sagt verður, at vertstjóðin, Grikkaland, ger nógv burtur úr at upplýsa um viðurkenning av tí einstaka og vinarlag tvørtur um mørk. Okkurt um 1300 menningartarnaði ítróttarfólk úr 48 lond taka lut í stóra festivalinum, og kappast verður bæði innan kurvabólt, svimjing og súkkling.

# Enn ein ósigur til Fremad Amager

**Allir tríggir føroyingarnar í Fremad Amager er fingu spælitíð, tá ið høvuðsstaðarliðið á útivølli tapti 1-2 móti Ølstykke mikukvøldið**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var tó einans Jann Ingi Petersen, sum var við á liðnum hjá Fremad Amager frá fyrsta bríksli. Bæði Hjalgrím Elttør og Andrew av Fløtum noyddust at taka til takkar við einum plássi á beinkinum, men teir fingu tó báðir eina fitta løtu á vøllinum.

**Byrjaði við buldur og brak**

Tað var ikki hissini byrjan, ið var upp á dystin. Longu tá ið eitt korter var farið av dystinum, hevði heimaliðið lagt seg á odda 2-1. Tað var annars liðið hjá føroyingunum, ið fekk fyrsta málið í dystinum, sum Mikkel Blavnsfeldt skoraði, longu tá ið fimm minuttir vóru leiktir. Tað gingu tó einans sjey minuttir, so høvdu vertirnir bæði javnað og lagt seg á odda. Fremad Amager royndi at trýsta fyri at fáa útjavnandi málið, og fleiri útskiftingar vóru gjørdar tíðliga í seinna hálvleiki. Jann Ingi Petersen var tikin út, tá ið fimm minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, og bert lítla løtu seinni vóru bæði Andrew av Fløtum og Hjalgrím Elttør sendir á vøllin í eini roynd at fáa útjavnandi málið. Tað leikaði eisini mangan hart á framman fyri málinum hjá Ølstykke, og millum annað hevði Andrew av Fløtum nakrar møguleikar at javna, men inn vildi bólturin ikki, og tí noyddist Fremad Amager enn einaferð at taka til takkar við einum ósigri á útivølli.



*Andrew av Fløtum hevði nakrar møguleikar at javna fyri Fremad Amager í dystinum móti Ølstykke, men eydnan var ikki við honum*



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað, ið fæst í Snarskivuni og á heimasíðu kommununar.

www.torshavn.fo

**Ólavsøkan 2004**

Viðvíkjandi sølu og tiltøkum

Freistin at flýggja inn umsóknarblaðið er sett til mánadagin 21. juni 2004 kl. 12.00.

Umsóknir, sum koma inn aftan á 21. juni 2004 kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.

**SKRIVSTOVUFÓLK**
**BÓKHALDARI**

Søkt verður eftir skrivstovufólki/bókhaldara at arbeiða ½ tíð at byrja beinan vegin.

**Høvuðsuppgávurnar eru m.a.:**
- bókhald
- vanligt skrivstovuarbeiði

**Førleikakrøv:**
- eina fyri starvið viðkomandi útbúgving
- evnir at kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hollan mál- og telduførleika

Umsókn við prógvum o.ø skal sendast til:

**HMP Consult sp/f**
Óluvugøta 12
100 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. mai 2004.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 312279 / 584000 og spyrja eftir Hans Haraldsen.

**HMP CONSULT Sp/f**
Óluvugøta 12 • FO-100 Tórshavn.
Telefon 312279 • Telefax 318346,
Teldupostur hmp@hmp-consult.com

SISERO 351800

hmp CONSULT
VERKFRØÐIRÁÐGEVING

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3777
**Navn:** Sp/f P.S.E.
**Adressa:** 470 Eiði

**Kommuna:** Eiðis Kommuna
**Stovningardato:** 26.04.2004
**Viðtøkudato:** 26.04.2004
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Petur Sofus Eidesgaard, 470 Eiði
**Stjórn:** Petur Sofus Eidesgaard, 470 Eiði
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift stjórans.
**Grannskoðari:** Sp/f Revisión, v/Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 26.04.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka útleiguvirksemi, handil og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 12. mai 2004*
*Kristin Balle*

**Fuglafjarðar skúli**

**Valevnislistar**

Valevnislistar til skúlastýrisvalið tann 25. mai 2004 eiga at verða latnir skúlastjóranum sum skjótast og í seinasta lagi týsdagin 18. mai.

**Valnevndin f. Fuglafjarðar skúla**

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Designskolen
Nykßbing F



Kursusstart
1. august 2004:

Hßjskoleophold
med liniefag: Graýk, billedkunst, tekstil samt valgfag

10. kl. med dansk, matematik og engelsk i kombination med et designfag: Graýk, billedkunst eller tekstil

Skolen for tekstil Å billedkunst Å graýk
Neckelmannsgade 5 Å 4800 Nykßbing F Å Tlf. 5486 0553
www.designskolen.dk Å email info@designskolen.dk

**Pedagogur**

Fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir pedagogi til ein stovn við 30 børnum í aldrinum 3-7 ár. Starvið er 30 tímar um vikuna á einari stovu við 15 børnum. Starvið verður at seta 16. august 2004 til uml. 23.januar 2005 .

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Starvið er lønt á lønarstigi 10-16.

Nærri upplýsingar um starvið og stovnin fáast við at venda sær til leiðaran.

Umsókn saman við avritum av prógvi og viðmælum verður at senda stovninum í seinasta lagi mánadagin 31. mai 2004.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður hjálparfólk sett í starv.

**Barnagarðurin Vípan**
Vípuvegur 3
100 Tórshavn
Tlf. 31 75 35

**Frítíðaravloysari til IRF í Norðoyggjum**

Søkt verður eftir 2 frítíðaravloysarum at byrja 7. og 28. juni. Einum avloysara til innsavning av húsarhaldsruski og einum til flutning av bingjum.

Neyðugt er at hava stóra koyrikortið.

Áhugað verða biðin um at ringja til tlf. 773306 og tosa við Jógvan Júst Olsen.

Umsóknarfreistin er 21. mai 2004.

IRF
Postboks 39
Leirvík

**Arbeiðsmenn**

Søkt verður eftir 2 royndum monnum at seta kantsteinar. Teir, ið settir verða koma at arbeiða í stóru útstykkingini Hoyvíkshagi Suður.

Størvini verða sett skjótast gjørligt.

**Byggisamtakið Hoyvíkshagi Suður**
Við Løgmannabreyt
FO-100 Tórshavn
Tlf. 316084/224965

**Til sølu**

Sera vælhildin summarhús við Limfjørðin í Danmark, stutt frá Ålborg til sølu.

**Tlf. 756524**